LM-067/2022

Dylgiskjal 20

Umhvørvis og vinnumálaráðið

Gongin 7

Tórshavn *9 sept. 2021*

Viðvíkjandi.: Uppskot til løgtingslóg um nátturuvernd.

Bóndafelag Føroya takkar fyri møguleikan at gera viðmerkingar til hetta uppskot, og fyri longda freist.

Yvirskipa hevur Bóndafelagið einki ímóti náturuvernd, heldur tvørtur ímóti, men hetta uppskot er sera umfatandi lógarverk, og kemur á ein ella annan hátt, meir og minnið at ávirka allar festarar og ognarar og onnur við, tí er sera umráðandi at slíkt lógarverk er væl umhugsa.

Hartil er eisini at viðmerkja, at tað ikki er nóg greitt hvussu hetta lógarverk skal umsitast og tíðskil kann hugsast, at tá ið eitt so umfatandi lógarverk í fleiri førum kann ella skal umsitast í kunngerðum, kann avleiðingin fyri landbúnaðin í fleiri førum bremsa fyri menning av hesum økinum.

Í nógv ár hevur verið ætlan um, at gera eina lendisætlan fyri landi, hetta arbeiði er ikki liðugt enn, og mæla vit tí til, at hetta verður gjørt áðrenn slíkt lógarverk verður sett í gildið.

Umráðandi er, at ein lendisætlan er grundarsteinurin fyri hvat og hvar vit skulu menna okkum og samstundis gevur okkum eina greiða fatan av, hvussu vit síggja menningarmøguleikar fyri føroyskan landbúnað.

Um landstýrið velur at koyra uppskotið í tingið, og gildiskoma fyri uppskotið er áðrenn lendisætlan er gjørd, tilskila vit okkum rættin at koma við meir ítøkiligum viðmerkingum.

Vegna Bóndafelag Føroya

Sigert Patursson

Formaður